Urtagarðshugni í Dølum

URTAGARÐSSØLA
Jan Müller

Eftir at hava staðið tómt og lívleyst nú í fleiri ár spírir og sprettir nú aftur í vakstrarhúsinum í Dølum, nærhendis Kirkjubø. Vakstrarhúsið, sum upprunaliga hoyrdi heima í Klaksvík, varð sett upp í Dølum í 1995, men higartil hevur so verið nærum øskukalt. Til urtagarðsfyritøkan "Hjálpirót" í Hoyvík, gjørdi avtalu við eigararnar um at leiga helvtina av tí 1200 fermetra stóra glashúsinum.

Torben Schneider, sum stendur fyri Hjálpirót, dylur ikki fyri, at hann er sera spentur um hetta spildurnýggja tiltak teirra, sum rætt og slætt er at lata upp sølu av plantum og blómum í einum sera sjáldsomum og hugnaligum umhvørvi. –Vit hava lagt stóran dent á at gera tað hugnaligt her úti, soleiðis at fólk kunnu kenna tað sum eru tey farin á eina lítla útferð. Tey fáa kaffi og køku og eitt urtagarðsprát og kunnu njóta vakra umhvørvi her, meðan tey kunnu hyggja eftir vøkru og vælangandi plantunum. Har verða so eisini krukkur, mold o.a. at fáa. Tey hjá Hjálpirót, sum eru sera virkin og dugnalig, hava gjørt eitt lítið springvatn og ein hyl mitt inni í vakstrarhúsinum. Har eru so eisini fiskar og kanariufuglar. Vakstrarhúsið liggur so eisini í einum sera vøkrum umhvørvi, ein vakur náttúrublettur millum báðar tær sermerktu bygdirnar Velbastað og Kirkjubø.

Torben Schneider, Lív Petersen og Andrass Olsen, sum øll arbeiða hjá Hjálpirót. Her eru tey í tí hugnaliga umhvørvinum í vakstrarhúsinum.
Mynd Jan Müller

Í fyrstu atløgu fara tey bara at selja plantur og blómur, sum koma aðrastaðni frá tvs. frá Skógrøkt Landsins og vakstrarhúsunum í Sandavági og á Tvøroyri. Nakað verður so innflutt úr Danmark eisini. Í løtuni er eingin hiti í vakstrarhúsunum, so tað er avmarkað, hvat ber til at hava í húsinum. Men ætlanin er seinni at fara undir ymsa framleiðslu har eisini við t.d. tomatum og agurkum.

Latið verður upp í dag

Latið verður fyri fyrstu ferð upp leygardagin klokkan 10. Opið verður til klokkan 18. Soleiðis verður hvønn gerandisdag, meðan tað sunnu- og halgidagar verður opið frá 14 til 18.

Tað verður Lív Petersen, sum er útbúgvin plantuskúlagartnari, ið fer at standa fyri nýggja tiltakinum. Hon hevur áður arbeitt hjá Hjálpirót og hevur annars staðið á odda fyri einum urtagarðssenturi í Danmark. Lív sær hetta sum eina stóra avbjóðing og vónar, at tiltakið fer at fáa undirtøku. Hon fer at gera sítt til, at fólk, sum leggja sær leiðina til hetta vakra plássið nærhendis Gomlurætt, fara at kenna seg væl.

Torben Schneider, sum ikki er bangin fyri at fáa mold undir neglirnar og sum hevur verið við til at skapa lív og hugna í mongum urtagørðum í Havn serstakliga, fer nú at fylgja væl við, hvussu hilnast. Vísir tað seg, at hetta er eitt skilagott og lønandi tiltak, útilokar hann ikki, at tey seinni í ár kunnu fara undir veruliga framleiðslu og tá taka støðu til, um tey kanska eisini kunnu keypa húsið. Eisini eru møguleikar fyri taka part av lendinum uttan fyri húsini uppí eina framtíðar framleiðslu.

Hjálpirót varð stovnað í 1987 og hava fólkini hjá fyritøkuniarbeitt sum anleggsgartnarar ymsa staðni í landinum. Nú vakstrarhúsið er komið inn í myndina kann man siga, at ringurin er endaður. Tað er tí við stórum spenningi, at Torben fer at fylgja við hesi verkætlanini. Sjálvir hava teir eisini brúk fyri plantum í sínum anleggsarbeiði, so talan kann blíva um eina skilagóða íløgu.

Hesa tíðina á árinum arbeiða eini 12 fólk hjá Hjálpirót, um veturin er minni at gera, og tá er arbeiði til eini fimm fólk.

KT-klekingardepilin

Lýsing eftir verkætlanum

Vinnumálastýrið lýsir eftir verkætlanum til nýstovnaða KT-Klekingardepilin.

Endamálið við klekingardeplinum er at skapa serligar karmar fyri menning av nýggjum KT-fyritøkum við at geva teimum virkisligar karmar og lætta teimum um atgongdina til fígging og ráðgeving í byrjanartíðini, tvs. í fyrstu stigunum í verkætlanartilgongdini, við tí máli at handilsgera teirra tøkniligu menningarhugskot.

Málbólkurin er íverksetarar, sum ynskja at stovna egið virki fyri at handilsgera hugskot um nýskapandi kunningartøkniligar vørur ella tænastur.

Depilin er skipaður undir leiðslu av einum stýri, sum m.a. tekur støðu til umsóknir. Depilin húsast á Menningarstovuni, men er møguleiki fyri, at verkætlanir eisini vera hýstar aðrastaðni í Føroyum samskipaðar undir deplinum á Menningarstovuni.

Depilin veitir:

- Ráðgeving til verkætlanirnar í KT-klekingardeplinum
- Samskipan av átøkum yvirfyri íleggjarum, framtaksfeløgum og fíggingarstovnum
- Skrivstovuhjálp og umsitingarligar tænastur, bókhald og løgfrøðiliga ráðgeving

Krøv til verkætlanir:

Til verkætlanir, sum skulu setast í verk undir KT- Klekingardeplinum, eru m.a. hesi krøv:

- Nýskapandi KT-hugskot, ið kunna mennast til vørur ella tænastur til úflutnings.
- Verkætlanin skal tá hon er komin í depilin verða skipað í serstakari løgfrøðiligari eind, t.d. í einstaklingavirki ella smápartafelag. Tað er ikki ein treyt, at ein fyritøka longu er stovnað, ella at ein liðug vøra/tænasta fyriliggur.

Hvør verkætlan kann verða húsað í deplinum í mesta lagi í 2 ár.

Umsókn/hugskotslýsing:

KT-Klekingardepilin viðgerð umsóknir leypandi. Í sambandi við hesa lýsing fer depilin tó at viðgera umsóknir/hugskotslýsingar, innkomnar áðrenn 21. mai 2001, undir einum.

Kravið til umsóknina er, í fyrsta umfari bert at hugskotið er væl lýst (1-2 síður). Tey hugskotið depilin metir hava ein burðardyggan møguleika, fáa hjálp til uppsetan av fullfíggjaðari virkisætlan við fíggjarætlan fyri tíðarskeiðið hjá verkætlanini í deplinum, sum síðani verður løgd fyri stýrið fyri KT-klekingardeplinum til støðugtakan

Umsóknir skulu sendast til: **KT-Klekingardepilin * Bryggjubakki 12 * 100 Tórshavn**. Nærri upplýsingar kunna fáast frá depilssamskipara, Símun Hammer á tlf. 449591, e-mail: konsult@konsult.fo. Reglugerðin fyri depilin er at finna á heimasíðuni hjá Menningarstovuni www.trade.fo.

VR-Bilar

Scania 94 D,
310 hk, við kassa og lyft.
km. 160.000.
árg. 12/97.
Fulla luftfjaðraskipan, spoilarasett.
Støddin á kassanum: longd 7,40m
breidd 2,44m
hædd 2,20m
Prísur kr. 570.000,-

Scania 142 M
við kassa.
árg. 1987.
Luftfjaðrar aftan og parabal fjaðrar framman.

Sp/f VR-bilar
Hoyvíkvegur 61
P.O.Box 3130
FO-110 Tórshavn
Tel. 322110 - Fax 322111
VOLVO
RENAULT

Norrøna skal sigla fyri Smyril

Strandferðslan fer at gera avtalu um at leiga Norrønu røkja Suðuroyarsiglingina, ímeðan Smyril er í dokk. Siglingin byrjar mánadagin

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
Áki Bertholdsen

Strandferðslan fer nú at gera avtalu við Smyril Line um at leiga Norrønu til at røkja suðuroyarsiglingina ímeðan Smyril er í dokk.

Væntandi verður Smyril ikki í dokk í meiri enn tríggjar dagar og ætlanin er at leiga Norrønu til suðuroyarsiglingina í tríggjar dagar.

Byrjað verður longu mánadagin og á Internetinum sigur Strandferðslan, at Norrøna siglur væntandi fyrsta túrin av Havnini, suður á Tvøroyri mánadagin kl. 12.

Seinastu tíðina hevur tað verið rættiliga trupult hjá Strandferðsluni at fáa kabalina at ganga upp.

Á ymsum farleiðum hevur rutusamsbandið verið óregluligt við tað, at ferjur og skip skulu í dokk. Í hesum sambandi hevur dokkingararbeiðið uppá Dúgvuna verið nógv meira umfatandi orsaka av einum størri motorskaða.

Strandferðslan leigaði tí eina avloysararferju frá Estlandi fyri Dúgvuna. Ætlanin var, at tá ið Dúgvan var afturkomin, skuldi hon setast í sigling um Suðuroyarfjørð, meðan Smyril er í dokk.

– Trupulleikin at seta ferjuna í sigling um Suðuroyarfjørð er, at Estlendska ferjan hevur ikki møguleika á dekkinum at surra lastvognar, og talan er um eitt umfatandi arbeiðið at sveisa festir í akfarsdekkið.

– Tí hevur Strandferðslan kannað aðrar loysnir fyri Suðuroyarfarleiðina og fara í staðin at gera avtalu við Smyril Line um at leiga Norrønu í 3 dagar. Hetta hevur við sær, at Scania kann fara avstað aftur úr Føroyum longu tann 9. mei, tá Dúgvan verður liðug.

Norrøna fer at sigla so vítt gjørligt eftir galdandi ferðaætlan, sum er lýst undir Broytingum. Fyrsti túrurin hjá Norrønu verður av Havini, mánadagin 7. mei, kl. 12:00 og seinastu túrurin av Tvøroyri, hósdagin 10. mei, kl. 06:00.

Strandferðslan roknar við, at tá ið mei mánaði er farin afturum, kemur siglingin á ymsu farleiðunum í eina tryggari legu og at ferjur og skip eru vónandi eftir dokkingarnar væl fyri at fara undir øktu siglingina í summar.

Kanna økini framvið vágni

Klaksvíkar kommuna roynir at fáa bilbukt við plásstrotinum á havnalagnum, og nýggjasta hugskotið er at fylla krókin sunnanfyri frystihúsið Northern Fish Cold Storage út

Klaksvíkar kommuna heldur seg hava funnið fram til fleiri møguleikar fyri at fáa meiri pláss fram við vágni

PLÁSSTROT
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Tekniska nevnd hjá Klaksvíkar kommunu hevur tikið stig til at kanna alt økið fram við vágni fyri at bøta um trupulleikarnar við plássi.

Í blaðnum í gjár greiddu vit frá, at bingjur nú verða settar í miðbýnum, tí plásstrot er á vestara havnalagi.

– Vit hava júst havt ein fund, har vit hava gjøgnumgingið øll umráðini við vágna, og vit hava funnið fram til fleiri áhugaverdar møguleikar fyri at fáa meiri pláss, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann gjørdi í blaðnum í gjár greitt, at miðbýurin skal ikki brúkast sum bingjupláss.

Fylla út vestaru megin

Málið um plásstrot á havnalagnum í Klaksvík hevur fleiri ferðir verið viðgjørt í býráðnum, og fleiri hugskot hava verið frammi um at loysa málið.

Býráðið hevur avgjørt at halda fram við at fylla út í Ánunum, har nýggj góðshavn er við at taka skap, men tað hevur eisini verið skotið upp, at vestara havnaøkið verður víðkað við útbyggja tað norðureftir.

Nýggjasta hugskotið, tá talan er um vestara havnalag, er at fylla krókin sunnanfyri Northern Fish Cold Storage út.

– Hesir krókurin verður sum er ikki brúktur til nakað skilagott, og tí er tað helst gott hugskot at fylla hann út. Vit høvdu fingið eitt gott kaiøki burtur úr tí, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

FERÐAÆTLAN SUMMARIÐ 2001
Tyrlutænastan

SUNNUDAG	Fráferð
Vágar	12.30
Gásadal	12.36
Mykines	12.42
Vágar	12.53
Vágar	13.00
Koltur	13.07
Tórshavn	13.12
Skúvoy	13.27
Dimun	13.32
Skúvoy	13.37
Tórshavn	13.52
Klaksvík	14.04
Klaksvík	14.35
Svínoy	14.47
Kirkja	14.51
Hattarvík	14.54
Klaksvík	15.12
Tórshavn	15.24
Koltur	15.29
Vágar	15.36

MIKUDAG	Fráferð
Vágar	09.45
Gásadal	09.51
Mykines	09.57
Vágar	10.08
Vágar	11.10
Koltur	11.17
Tórshavn	11.22
Skúvoy	11.37
Dimun	11.42
Froðba	11.51
Froðba	12.35
Dimun	12.44
Skúvoy	12.49
Tórshavn	13.04
Klaksvík	13.16
Svínoy	13.28
Kirkja	13.32
Hattarvík	13.35
Klaksvík	13.53
Klaksvík	14.40
Tórshavn	14.52
Koltur	14.57
Vágar	15.04

FRÍGGJADAG	Fráferð
Vágar	09.45
Gásadal	09.51
Mykines	09.57
Vágar	10.08
Vágar	11.10
Koltur	11.17
Tórshavn	11.22
Skúvoy	11.37
Dimun	11.42
Froðba	11.51
Froðba	12.35
Dimun	12.44
Skúvoy	12.49
Tórshavn	13.04
Klaksvík	13.16
Svínoy	13.28
Kirkja	13.32
Hattarvík	13.35
Klaksvík	13.53
Klaksvík	14.40
Tórshavn	14.52
Koltur	14.57
Vágar	15.04
Mykines	15.30
Gásadal	15.36
Mykines	15.42
Vágar	15.53

Frá/til	Mikines	Gásadal	Vágar	Koltur	Tórshavn	Skúvoy	Dimun	Froðba	Klaksvík	Svínoy	Hattarvík	Kirkja
Mikines		85,-	145,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	360,-	360,-	360,-	360,-
Gásadal	85,-		145,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	360,-	360,-	360,-	360,-
Vágar	145,-	145,-		130,-	215,-	335,-	335,-	360,-	360,-	360,-	360,-	360,-
Koltur	290,-	290,-	130,-		85,-	215,-	215,-	290,-	290,-	290,-	290,-	290,-
Tórshavn	215,-	215,-	215,-	85,-		130,-	130,-	215,-	215,-	215,-	215,-	215,-
Skúvoy	335,-	335,-	335,-	215,-	130,-		85,-	85,-	335,-	335,-	335,-	335,-
Dimun	335,-	335,-	335,-	215,-	130,-	85,-		85,-	335,-	335,-	335,-	335,-
Froðba	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	85,-	85,-		360,-	360,-	360,-	360,-
Klaksvík	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-		110,-	110,-	110,-
Svínoy	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	110,-		110,-	110,-
Hattarvík	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	110,-	110,-		85,-
Kirkja	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	110,-	110,-	85,-	

BÍLEGGING
Tel 34 10 10 - Fax 34 10 01
Mánadag - Friggjadag
Kl 08.00 - 16.00
Sunnudag
Kl. 12.00 - 16.00

BØRN
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

VIÐFØRI
Í mest lagi 20 kg.

- galdandi 1. mai - 1. oktober 2001

ATLANTIC AIRWAYS
Tel 34 10 10 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo